## Miðflokkurin klárur

Miðflokkurin stillar upp 10 valevni til Fólkatingsvalið 13. november. Teirra millum eru allir løgtingsmenn floksins, Jenis av Rana, Karsten Hansen og Bill Justinussen. Listin er hesin: Arni Abrahamsen, Undir Gøtueiði, Karsten Hansen, Klaksvík, Egin Henriksen, Tórshavn, Frank Jacobsen, Tórshavn, Mia av Kák Joensen, Sørvágur, Bill Justinussen, Glyvrar, Jaspur Langaard, Nes, Charlotta á Váli Olsen, Tórshavn, Hjørdis Háberg Petersen, Kollafjørður og Jenis av Rana, Tórshavn. Lesið meiri um valskrá Miðfloksins í Sosialinum mánadagin.



## Uppstilling ikki almenn

Sambært skrivaranum hjá Javnaðarflokkinum, er flokkurin liðugur við sína uppstilling til fólkatingsvalið. Men enn er listin ikki almennur. Talan er tó sum skilst um 25 valevni, 13 kvinnur og 12 menn. Meiri verður at frætta um listan og um valskrá Javnaðarfloksins í Sosialinum mánadagin.

# Flogvøllur má koma

**- Við nýggja uppskotinum hjá Magnusi Hansen um flogvøll hava vit heili tvey frálík øki at vísa á í kommununi, og við møgulekanum við langari breyt umframt krossbreyt sær Nólsoy ógvuliga áhugavert út, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri**

FLOGVØLLUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Skulu vit menna okkum sum samfelag, so er neyðugt við álítandi ferðasambandi til útheimin, og tann tørvin nøkta vit best við einum nýggjum flogvølli í miðstaðarøkinum, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu*

- Øll framkomin samfeløg hava álítandi samband við umheimin, og tað mugu vit sjálvandi eisini hava.

Tað sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu.

Men hann metir kortini ikki, at flogvøllurin vesturi í Vágum eigur at latast aftur heilt, men framhaldandi at verða nýttur sum alternativur flogvøllur.

- Við alsamt betri infrakervi verður eingin trupulleiki at flyta starvsfólk millum ein flogvøll í miðstaðarøkinum og vøllin í Vágunum, sigur borgarstjórin í Havn.

Men hann heldur eisini, at vit mugu halda uppat við at stara okkum blind upp á Vágar sum einastu loysn. Serliga seinastu vikurnar hava víst, at reglusemið við einum flogvølli vesturi í Vágum er alt ov vánaligt, og tí mugu vit stutt sagt fáa ein flogvøll aftrat í Føroyum.

- Tað er heilt náttúrligt at leggja ein nýggjan flogvøll í miðstaðarøkinum. Her búgva flest fólk og her liggja flestu vinnufyritøkurnar. Og við nýggja uppskotinum um flogvøll í Nólsoy, hava vit heili tvey frálík øki at vísa á, sigur Heðin Mortensen.

Umframt Nólsoy sipar borgarstjórin sjálvandi til Glyvursnes, sum gjøgnum mong ár við jøvnum millumbilum hevur verið uppi og vent. Vindmátingar eru eisini gjørdar úti á Glyvursnesi gjøgnum mong ár, men í løtuni ger Ladsverk nýggjar mátingar har úti, tó ikki á sama stað sum tær gomlu.

Tá tað snýr seg um Nólsoy, hevur danska veðurtænastan gjøgnum fleri mannaminnir mált vindin suðuri á Borðuni, so har skuldu verið álítandi hagtøl til taks, umenn neyðugt møguliga kann gerast at fremja vindmátingar aðrar staðir á oynni.

### Standa saman

Heðin Mortensen sigur, at býráðið bara kann síggja positivt uppá, um ein nýggjur flogvøllur verður lagdur í kommununi. Og í hansara verð er eingin ivi:

- Eg dugi bara at síggja tveir møguleikar, tá tað kemur til nýggjan flogvøll í Føroyum, Nólsoy ella Glyvursnes. Út á Glyvursnes er eingin trupulleiki við samferðsluni, men tað er givið, at verður flogvøllurin lagdur úti í Nólsoy, verður avgerandi neyðugt við einum undirsjóvartunli út í oynna, sigur Heðin Mortensen.

Hann vísir samstundis á, at her er talan um eina íløgu, sum skal røkka kanska fleiri árhundraðir inn í framtíðina, og tí eigur kostnaðurin ikki at forða fyri teirri bestu loysnini.

- Men vit mugu taka okkum saman sum eitt samlað samfelag, tí skulu vit menna okkum, bæði tá tað snýr seg um ferðavinnu og vinnulív sum heild, er neyðugt við álítandi ferðasambandi til útheimin, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at hann eyðvitað ikki er serfrøðingur innan flogtekniska økið, men at hann frá flogskiparum hevur hoyrt, at Nólsoy í nógvar mátar er ógvuliga væl egnað til flogvøll, ikki bara tí at møguleiki verður fyri longsta vølli, sum landið innan rímilig mørk kann byggja, men eisini tí talan kann gerast um krossbana.

- Eisini havi eg skilt á serfrøðingum, at lítil og eingin turbulensum er har úti, har er frítt fyri við ongum fjøllum og góðum sýni í allar ættir, sigur borgarstjórin í Havn.

Hann leggur kortini dent á, at vit øll eiga at standa saman í hesum málinum. Og tað eina útilokar ikki hitt.

- Nærum alla aðra staðni í heiminum finnast fleiri flogvallir, og tí skulu vit eisini varðveita flogvøllin í Vágum sum ein alternavitan vøll. Verður ein nýggjur flogvøllur bygdur í Nólsoy, fáa vit eisini samstundis fast samband út í oynna, og tað hevði ment alt miðstaðarøkið. Og eg eri sannførdur um, at tað er nógv tann besta besta loysnin, sigur Heðin Mortensen.

# Nú fara vágbingar at grava

**Vágs Býráð hevur nú samtykt at geva loyvi til at grava vegin til ætlaða ellis- og røktarheimið, sum skal byggjast í Vági. Samstundis verður seinasta hond løgd á tekningarnar**

ÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hevur ikki nógv verið at hoyrt til ætlanin at byggja tað nýggja ellis- og røktarheimið í Vági.

Men tað merkir ikki, at arbeiðið hevur ligið stilt

Arbeiðið hevur alsamt verið at fyrireikað bygginina av hesum umstríddа ellis- og røktarheiminum og nú er við at nærkast, at spakin kann setast í.

Og fyrr í vikuni var málið um at byggja ellis-og røktarheimið aftur fyri í Vágs Býráð.

Tá viðgjørdi býráðið spurningin um at geva loyvi at loyvi til at grava, planera og gera vegin í sambandi við Ellis- og Røktarheimið.

Uppskotið varð einmælt samtykt men nú skal málið fyri friðingarnevndina og yvirfriðingarnevndina, sum er vanlig mannagongd.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, sigur, at eftir tí, hon hevur skilt, verður ongir trupulleikar av friðingarmyndugleikunum.

Annarsverðursjálvtbyggiloyvið ikki latið, fyrrenn tekningarnar eru lidnar.

Borgarstjórin sigur, at enn er ikki greitt, nær tekningarnar verða lidnar, men nú verður síðsta hond løgd á teir.

Hon vónar, at hon vónar, at farast kann undir vegin nú í novembur, men nær tað verður klárt at fara undir sjálva byggingina, dugir hon ikki at siga.

Eftir ætlanini verður pláss fyri 24 fólkum á ellis- og røktarheiminum og har skal eisini pláss vera til minnisveik.

Í sama viðfangi ætlar landið at byggja ein stovn til sinnisveik og á honum vera pláss til átta búfólk, umframt at tvey fólk vera til umlætting.



*Hóast lítið hevur verið at hoyrt nú í eina tíð, er tað framvegis lív í arbeiðnum at fyrireika umstrídda ellis- og røktarheimið í býnum og nú er komið so langt, at vegurin skal gerast til grundstykkið. Soleiðis hugsaði arkitekturin sær, at tað kundi síggja út og nú verður síðsta hond løgd á tekningarnar*